# Stanley hugnaði sær í Atlantis



Mynd: Dávur Winther

**Talan var um eina framúr hugnaliga konsert í Atlantis seinasta leygarkvøld, fræsttist úr Klaksvík.**

Hesaferð var Stanley saman við bólkinum Trio Acoustica, ið eisini flokkar seg sum Folk, Jazz, Blues, Contry, Latin Singer/Songwriter.

Sum spælimenn vóru teir allir í serflokki – væl samanspældir, og sera hegnisligir guittarleikarar: Øistein Rian og Steen-Vidar Larsen, sum saman við Stanley Samuelsen høvdu hvør sín góða leiklut. Men í hópi vóru teir eisini sum ein góð eind.

Teir rættiliga hugnaðu sær og kíndu fyri løgunum eftir t.d. Cat Stevens, Eagles, Cornelis Vreeswijk og ikki um at tala, Beatles, fræsttist úr Klaksvík.

Teir spældu og sungu eisini egin løg, og so ikki minst tær mongu perlurnar hjá Stanley.

# Fundaðust um samanlegging av fótbóltinum í Suðuroynni

**Fríggjakvøldið var fundur í Øravík, har ítróttarfeløg í Suðuroynni høvdu kunnandi fund um ætlanir um at leggja saman, tá tað ræður um fótbólt í oynni**

FUNDUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hóast samanlegging av fótbóltinum í Suðuroynni óivað er nakað, sum fólk ganga uppí, so møttu bert eini 40 fólk, tá ítróttarfeløg í oynni boðaðu limum til kunnandi fund í Øravík fríggjakvøldið um ætlaða samanlegging.

Jógvan Páll Lassen, sakførari, greiddi frá leistinum, sum stungin var út í kortið. Hann segði, at ætlandi skuldu gomlu feløgini halda fram, meðan bestu spælararnir í ymsu feløgunum savnast á felagsliðnum.

Fólk vóru ymisk á máli og høvdu spurningar, tá orðið gjørdist frítt. Nógv tyktust jalig, men tað vóru eisini tey, ið stóðu heldur ivandi í síni støðugtakan.

Tað er ikki at ganga nøkrum ov nær, um sagt verður, at serliga vóru tað limir í TB, sum høvdu ivaspurningar, og formaðurin í TB svaraði eisini einum spurningi um metingar millum limirnar, at um hann hevði loddað dýpið rætt, so var enn ikki meirluti millum limirnar fyri samanlegging.

Feløgini í Suðuroynni hava ætlandi øll aðalfund 10. oktober, har støða skal takast til spurningin um samanlegging.



# 50 ára gamalt felag havt ársaðalfund

**Froskmannafelagið, Tórshavnar Froskmannafelag , sum í ár hevur 50 ár á baki, hevði um vikuskiftið ársaðalfund.**

FROSKMENN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Fundurin var hildin sambært lógum felagsins og eitt av tí fyrsta á skránni var ársfrágreiðing formansins. Í framløgu síni hugdi formaðurin, Karl R.Vang, aftur á árið ið fór og frøddist millum annað um, at felagið, sum júst hevur hátíðarhildi sín fimmtiára stovningardag, enn er eitt ungt og livandi felag. Hann mátti tó eisini siga sum var, at tað kendist sera hugstoytt at felagið, sum er elsta felag av sínum slag í landinum og næst elst í ríkinum, eftir 50 árum, ikki longur veit um tað hevur nøkur hølir at húsast í. Hann segði seg vóna, at ein munagóð loysn var funnin á hesum málinum innan stutta tíð.

Í ár stóðu tríggir av nevndarlimunum fyri vali og vóru tilsamans fimm fólk skotin upp til valið.

Jákup Fonnsdal og Karl R.Vang vóru afturvaldir og Jónsvein Berg er nýggjur í nevndini.

Nevndin skipaði seg eftir fundin og sær hon soleiðis út: Karl R. Vang, formaður, Arnold Nielsen, kassameistari, Jákup Fonnsdal, skrivari, Anna Louisa Jonsen, nevndarlimur og Jónsvein Berg, nevndarlimur.

Felagið hevur heimasíðu www.kaving.fo, har nógv forvitnisligt er at síggja.

# 100 ára haldið byrjað

**Sunnudagin setti Vágs Kommuna hol á 100 ára haldið. Í samband við at kommunan verður 100 ár eru tiltøk á skránni hvønn dag í vikuni**

100 ÁR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Sunnudagin kom eisini nýggj standmynd í býarmyndina í Vági. Í trýkantinum, har nýggjársbálið er á hvørjum ári, stendur myndin, sum Hans í Líðini hevur gjørt og sum S/pf Rock hevur latið.*

*Mynd: Johannus Andreasen*

Sunnudagin var familjuguðstænasta, myndaframsýningar og sang- og fyrilestrakvøld í Bethel, og í Stóra Pakkhúsi hildu Hans Joensen – Hans í Líðini – og Poul Andreasen siðsøguligar fyrilestrar.

Hans Joensen greiddi frá sluppini Johonnu og Poul Andreasen greiddi frá Vágs søgu.

Hann hevur eisni greitt úr hondum bókarøðina Vágs Søga, har av 3. bókin er væntandi um eitt lítið ár.

Vegna Vágs Kommunu handaði Kirsten Strøm Bech, borgarstjóri, Hans í Líðini gávu, og hon handaði eisini Poul Andreasen heiðursgávu fyri avrikið at hava skrivað Vágs Søgu. Gávan var 10.000 krónur.

Sunnudagin kom eisini nýggj standmynd í býarmyndina í Vági. Í trýkantinum, har nýggjársbálið er á hvørjum ári, stendur myndin, sum Hans í Líðini hevur gjørt og sum S/pf Rock hevur latið. Hetta er mynd, ið gjørd er úr stali og sum ímyndar ymiskt, ið eyðkennir Vág, so sum t.d. gomlu grindabátarnir.

Mánadagin var hópur av tiltøkum á skránni. Mánamorgunin byrjaði við morgunsvimjingin og hylurin er opin hvønn morgun hesa vikuna. Hylurin er heitur.

Skótar høvdu sølu í Garðatúni frá klokkan 15 til 18 og klokkan 18 var møguligt at síggja verkætlanararbeiði í Vágs Skúla, sum næmingar hava gjørt, og evnini eru úr Vágs søgu. Framsýningin stendur uppi alla vikuna í skúlanum. Klokkan 19 høvdu skúlaungdómar framførslu í Framtíðini.

Týsdagurin bjóðar m.a at býráðið avdúkar gávu til borgararnar, har børn eisini syngja, sýningar av ymsum slag halda fram, kappingar og spøl eru í svimjihøllini og tónleikacafé er í Pretty Payal frá 18 til 21.